gult cyan magenta svart

Tíðindaskriv:

Oljuprísir í Føroyum sammett við hini Norðurlondini

Hákun Djurhuus,
stjóri
P/F Føroya Shell

Nú hava fleiri persónar og stovnar viðgjørt bensin- og oljuprísir, men tað eru fægstu teirra, sum veruliga hava gjørt sær ómak í hesum sambandi. Tí haldi eg tað vera hóskandi at koma við nøkrum faktuellum upplýsingum á hesum økinum.

Prísir hjá Føroya Shell verða settir í mun til okkara innkeyp og hvussu prístøðan annars er í Føroyum. Innkeypt verður í dollarum og vit fáa ikki fastan prís frá okkara veitara, men hesin broytist samsvarandi Rotterdam noteringunum fyri tær ymsu oljuvørurnar.

Eru oljuprísirnir í Føroyum kappingarførir?

Í øllum vesturheiminum hava landsins stjórnin lagt munandi avgjøld á hesar vørur og ikki nóg mikið við tað, tað verður sjálvandi eisini lagt MVG oman á prísin á vørunum. Skal ein sammeta prísir hjá oljufeløgum millum lond, so er neyðugt at reinsa prísirnar fyri avgjøldini.

Við at taka avgjøldini úr prísinum rokna allar prísir um til føroyskar krónur við kursinum pr. 1/2-2001, so kunnu prísirnir beinleiðis samanberast við teir føroysku prísirnar.

Tá ið hetta verður gjørt, so sæst at føroysku oljuprísirnir eru fult kappingarførir við prísirnar í grannalondum okkara. Besta prógvið fyri hesi útsøgn fæst við at hyggja at niðan fyri uppsettu talvur, sum eg havi gjørt nú tvær ferðir bæði tann 6/3-2000 og í dag tann 2/2-2001. Spurt er í Danmark, Noregi og Íslandi um vegleiðandi prísir hjá oljufeløgum fyri Gassolju, Bensin blýfrítt 98 og Diesel.

Eisini er uppsett, hvussu nógv avgjøldini eru, og hvørjir brúkaraprísirnir er, alt hetta í føroyskum krónum.

Fyri gassoljuna er galdandi, at vit skulu keypa vøru, flyta hana til Føroya við tilhoyrandi gjøldum, hava hana í goymslutangum, útlevera hana við tangabilum og umsita alt hetta.

Fyri bensin og diesel er sama galdandi. Har umframt skulu vit eisini útlevera vøruna av góðkendum sølustað. Við tað at Føroyar eru eitt oyggjasamfelag, so er brúk fyri forholdsvís nógvum sølustøðum. Hetta viðførir, at um tú sammetir við sølutølini hjá útlenmdskum støðum, so hava útlendsku støðirnar í miðal nógv fleiri seldar litrar pr. ár enn ein føroysk stað, og tí ber eisini til hjá útlendskum støðum at taka minni fyri hesar vørur.

Niðurstøðan av hesi kanning er sostatt, at føroysku oljuprísirnir eru fult kappingarførir við prísirnar í grannalondum okkara.

Tað ber heldur ikki til at tosa um vinning á bensin- og dieselprísum, samstundis sum sammetingar blíva gjørdar við úrslitið hjá Føroya Shell, tí virksemi okkara er nógv annað enn at selja bensin og diesel til bilar í Føroyum. Av samlaðu seldu nøgd okkara í 2000, standa bensin og diesel bert fyri 5% av seldu nøgdini.

Vónandi kann hendan frágreiðing vera við til at beina farna orðaskifti inn aftur á rætta kós og lata tað byggja á faktuellar upplýsingar, heldur enn á pástandir og illgitingar.

	6/3-2000 DKK/litur	Føroyar	Noreg	Ísland	Danmark
Gassolja	**Oljufelag**	**2,24**	**2,80**	**2,86**	**2,53**
	Alm. avgj.	1,26	1,39	0,71	3,13
	Brúkari	3,50	4,19	3,57	5,66
Bensin	**Oljufelag**	**3,66**	**3,28**	**3,87**	**2,95**
	Alm. avgj.	4,73	6,75	6,04	5,58
	Brúkari	8,39	10,03	9,91	8,53
Diesel	**Oljufelag**	**2,96**	**3,15**	**3,24**	**2,93**
	Alm. avgjald	1,44	5,78	0,81	3,95
	Brúkari	4,40	8,93	4,05	6,88

	2/2-2001 DKK/litur	Føroyar	Noreg	Ísland	Danmark
Gassolja	**Oljufelag**	**2,48**	**3,21**	**2,99**	**2,58**
	Alm. avgj.	1,42	1,74	0,48	3,14
	Brúkari	3,90	4,95	3,47	5,72
Bensin	**Oljufelag**	**3,75**	**3,06**	**2,76**	**2,69**
	Alm. avgj.	4,75	6,11	6,44	5,64
	Brúkari	8,50	9,17	9,20	8,33
Diesel	**Oljufelag**	**3,35**	**3,32**	**2,76**	**2,88**
	Alm. avgj.	1,64	4,76	1,49	3,93
	Brúkari	4,99	8,08	4,25	6,81

Fyri tann prísin, sum eitt oljufelag tekur fyri oman fyri nevndu vørur, skal ein hefta seg við, at prísurin, umframt at geva av sær vinning, eisini skal dekka nógvar útreiðslur.

VIÐMERKING

Um bygdamenning, økismenning og oljuvinnu

Niels Midjord

Í eini viðtalu við formannin í Útoyggjanevndini í eini morgunrás herfyri byrjaði Hilmar Jan við eini hugleiðing um bygdamenning og økismenning. Hann helt, at nú hoyrdist ikki so nógv til orðið bygdamenning longur, og tað var kanska líka gott, tí har vóru ikki tey stóru úrslitini at síggja, og tað lá líkasum í luftini, at hann var bangin fyri, at økismenningin fór at fáa somu lagnu. Lítið er at ivast í, at eru vit ikki høvdið framman fyri menningini og stýra henni, so fær Hilmar Jan rætt í sínum spádómum.

Onki kom tó ikki burtur úr bygdamenningarhugsjónini. Ein liður í hesi stremban var at útbyggja samferðslunetið, so koyrandi var til allar bygdir, har til bar at gera veg. Í mong ár fór Landsverkfrøðingurin við helminginum av fíggjarlógini, og nú er komið so langt áleiðis, at til ber at síggja burtur frá teimum einstøku bygdunum og tosa um økismenning í staðin.

Hetta hvur m.a. broytt fortreytirnar fyri kommunupolitikki almikið, sjálvt um kanska ikki allir kommunupolitikarar hava varnast tað enn. Meðan tað fyrr var høvuðsmálið hjá kommunupolitikarum at fáa arbeiðspláss til bygdina, er hetta ikki nóg mikið longur. Tey, sum nú seta búgv, munnu fyrst og fremst spyrja, hvussu útlitini eru fyri at húskið kann trívast á tí staði, tey hava valt at búseta seg í: Um trygt er at búgva har, um ampar eru av vinnuni ella av ferðsluni á staðnum, um tey ekkaleys kunnu lova børnunum út at spæla, um ansingar- og útbúgvingarmøguleikar, um frítíðar- og felagsvirksemi, um útboðið av handlum osfr. Í hesum sambandi vigar tað minni, um tú kanst fáa arbeiði á staðnum, bara arbeiði er at fáa í økinum, tí tú fert kortini til arbeiðis í bili, og um tú koyrir 20 minuttir meira ella minni hevur ongan týdning.

Tað skerst ikki burtur, at tess størri búsetingin er, tess størri og fjølbroyttari og meira professionelt verður útboðið, og tess meira lokkandi kann tað tykjast at búseta seg har; men tað er eisini ein andsøgn í hesum. Ætlar tú t.d. at finna siðbundna heimliga mentan, so skalt tú ikki fara til stórbýirnar at leita, tí teir eru allir líka.

Hevði einaferð ein danskan gestalærara, sum lýsti føroysku mentanina við orðinum »usamtidighed«. Samstundis sum vit liva í telduøldini við øllum nútímans hentleikum og rákum, so røkta vit seyðin, røkja bjørgini, fara á flot, kvøða osfr. á nakað sama hátt, sum vit hava gjørt í øldir. Hetta, helt hann, gav føroysku mentanini eitt kjølfesti og eitt fjølbroytni og eina kraft, sum hann ikki hevði sað aðra staðni. Tað er kanska nakað av hesum, sum arkitektarnir aftan fyri bygdamenningina í síni tíð hildu vera vert at varðveita. Harafturat kemur, at tær smærru bygdirnar eru betur førar fyri at standa ímóti eini kreppu, millum annað tí innløgumøguleikarnir eru betri har. Og so kann eg ikki lata vera við at nevna eini viðurskifti afturat, sum skulu standa fyri egna rokning.

Hjá okkum verður lívið hjá tí einstaka skipað og lagt til rættis av ansingar- og útbúgvingarstovnum frá vøgguni og langt upp í vaksnan aldur. Hetta er neyðugt, soleiðis sum samfelagið nú sær út, men tað er ikki vist, at hetta er tað besta fyri børnini, og ikki er tað hetta, sum ger tey best før fyri sjálvstøðugt og við persónligum kjølfesti at møta teimum alsamt skiftandi krøvunum, sum tekniska menningin setir. Nógv betri og meira mennandi fyri sjálvsmenskuna hevði tað verið, um umhvørvið har børnini vuksu upp, var so trygt, at tey sjálv í størri mun fríð og ekkaleys kundu farið út og gjørt sínar egnu royndir og nýtt sítt egna hugflog, uttan at vaksin blandaðu seg uppí. Eitt sovorðið umhvørvi er lættari at fáa fram á bygd, og tí eri eg ivaleysur í, at bygdarbørn alt annað líka eru betur brynjað til at møta tíðarinnar innbjóðingum, enn býarbørn eru tað.

Fáur man ivast í, eftir tað sum longu er skrivað, at undirritaði hellir til økismenning heldur enn til miðsavnan. Spurningurin er so, hvussu økismenningin kann fremjast í verki. Ein møguleiki er at syndra almennar stovnar og spjaða teir út um landið; men hetta er kanska ikki so heppið, tí í flestu førum man tað ganga út yvir dygdina og effektivitetin. Ein annar møguleiki er at býta tey ymisku virkisøkini upp, so at miðstaðarøkið í høvuðsheitum tekur sær av miðfyrisitingini og teirri hægri útbúgving og gransking og menning, sum hoyrir henni til, eitt annað økið tekur sær í høvuðsheitum av fiskivinnuni og teirri hægri útbúgving og gransking og menning, sum hoyrir henni til, og eitt triðja øki tekur sær av oljuvinnuni og teirri hægri útbúgving og gransking og menning, sum hoyrir henni til. Á henda hátt hevði tað borið til at spjatt atdráttarmegina frá teimum ymisku vinnugreinunum og gjørt tað møguligt, at tær kundu liva síð um síð, soleiðis at føroyska samfelagið, tá ið oljuævintýrið var av, kundi hildið áfram toluliga snikkaleyst.

Sum nú er, er tað miðstaðarøkið, sum hevur ta størstu atdráttarmegina. Tað er har, tey flestu av teimum, sum kreppan í 90-unum rak av landinum og sum nú eru heimafturkomin, velja at seta búgv. Um nú oljuvinnan verður løgd í sama øki, er vandi fyri at atdráttarmegin at miðstaðarøkinum verður so sterk, at hon kollrennur øll hini økini og allar hinar vinnugreinarnar við. Her verða teir stóru pengarnir at vinna, og her verða eisini teir bestu og mest fjøltáttaðu møguleikarnir fyri at brúka pengarnar. Tað er tí væl hugsandi, um oljuvinnan verður løgd í miðstaðarøkinum, sama um tað verður í Havn ella í Runavík, at allir føroyingar, tá ið oljuævintýrið er av, fara at búgva í einum og sama býi við ongari siðbundnari heimligari mentan, og har arbeiðsloysi og mistreysti ræður. Í mínum hugaheimi verður hetta byrjanin til endan.

Møguliga havi eg misskilt okkurt, men avgerðin um hvar í landinum oljuvinnan skal leggjast, er eitt politiskt stórmál, um nakað er tað. Vit hava valt politikararnar til at stýra landinum og at seta út í kortið, hvussu landið skal síggja út í framtíðini. At lata oljuvinnuna sjálva avgera hetta er at skáka sær undan ábyrgd, og tað kann fáa óbótaligar fylgjur fyri samfelagið.

ítróttur

Nr. 33 • fríggjadagur • 16. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Støðan 1. deild menn

	dystir	v -	j -	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	2	2 -	0 -	0	453	329	124	16
2 StÍF	2	2 -	0 -	0	413	358	55	12
3 Kyndil	2	1 -	1 -	0	389	349	40	11
4 Neistin	2	1 -	0 -	1	332	355	-23	8
5 KÍF	3	1 -	1 -	1	337	387	-50	6
6 H71	3	0 -	0 -	3	384	432	-48	4
7 Tjaldur	2	0 -	0 -	2	319	417	-98	3

H71–StÍF 22–31 (7–17)

H71 gav onga mótstøðu

Timburmenninir vóru burtur, men talan var sjáldan um sjampanjuhondbólt, tá StÍF vitjaði H71. Strandingar høvdu tó ongar trupulleikar av at vinna ein tryggan sigur á einum sera tomum H71 liði

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er ikki undur í, um strandingar vóru nakað moyrir, tá teir mikukvøldið fóru til Havnar, har dystur móti H71 stóð á skránni.

Steypasigurin hevur ivaleyst verið hátíðarhildin inni á Skálafirðinum, og tí kundi kanska hugsast, at H71 fór at hava ein veruligan møguleika í dystinum. Ikki minst tí tað ofta er trupult hjá einum liði at seta seg upp, beint eftir at hava spælt ein somikið týdningarmiklan dyst, sum ein steypafinala er.

Eingin mótstøða

Tað var tó skjótt greitt, at hoyvíkingar so avgjørt ikki skuldu rokna við nakrari lættari uppgávu mikukvøldið, tí strandingar lupu beinan vegin frá vertunum.

Verjuspælið hekk alt fyri eitt hampuliga væl saman, og í øllum førum megnaði seint gangandi uppspælið hjá H71 ikki at spæla seg fram við verjuni. Í álopinum koyrdu strandingar ikki heilt so skjótt, sum vit sóu teir gera í finaludystinum, og millum annað hevði venjarin sett seg sjálvan á beinkin, men alt hetta sá tó ikki út til at nerva teir á nakran hátt.

Heimaliðið fekk vall fótin til jørðina hendan fyrra hálva tíman, og hálvleiksstøðan sigur helst eisini alt um, hvussu leikur fór.

Lítil stirðil í

Tá liðini fóru á vøllin í seinna hálvleiki, var so at siga longu greitt, hvør skuldi hava sigurin, og seinni hálvi tímin var so avgjørt eisini merktur av hesum. Hoyvíkingar sluppu nú eisini at pynta nakað um úrslitið, men í longum løtum var dysturin mest átøkur eini parodi upp á hondbóltsspæl.

Høvdu leikarar brent, tímdu teir nóg illa at renna aftur, og soleiðis var tað als ikki nøkur óvanlig sjón, at síggja leikarar standa spjaddar kring vøllin. Kanska tí teir ikki tímdu at renna, ella eisini vónaðu teir at fáa eina langa sending fram, so teir aftur kundu gerast leysir við málverjanum.

Tá dysturin so at enda var liðugur, hevði H71 megnað at fylgt við í málskjótingini í seinna hálvleiki, men orsøkin til hetta var einføld. Tað fingu teir loyvi til frá gestunum, sum høvdu nýtt fyrra hálva tíman til at avgera alt.

Halgir og hini

Umframt at dysturin gav eina týðilig ímynd av styrkismuninum millum liðini bæði, so sýndi hann eisini, hvussu smalur hópurin hjá hoyvíkingum er í løtuni. Liðið er eisini merkt av, at spælarar, sum hava spælt við í vetur, nú eru farnir undir fótbóltsvenjingina, og tí ikki longur eru tøkir til hondbóltin. Ein teirra, sum tó framvegis er at síggja, er Hallur Danielsen, men eisini hann má spæla við skerdari megi.

Sostatt fekk hann ikki byrjanina av dystinum við, tí hann fyrst skuldi vera liðugur við fótbóltsvenjingina, og tað er sjálvsagt, at avrik hansara varð merkt av, at hann júst hevði vant í góðan tíma, áðrenn hann fór at spæla hondbólt.

Halgir Dahl Olesen er í løtuni einasti landsliðsspælarin hjá hoyvíkingum, og hóast tapið, so varð dysturin eisini ein undirstrikan av, hvussu stóran týdning hann hevur fyri liðið.

Í fyrra hálvleiki fekk H71 sjey mál, og á hvørjum tí einasta av hesum stóð navnið á liðskiparanum við átta-talinum á rygginum. Einki er at ivast í, at Halgir er ein fínur spælari, og at hann hevði havt stóran týdning á flestu førosku hondbóltsliðum, men tað kann ikki vera rætt, at liðið í so stóran mun skal líta á evnini hjá einum einstøkum leikara. Verður hetta ikki rættað til komandi uppgávurnar, er vandin helst stórur fyri, at H71 má síggja Tjaldri fara fram um seg á stigatalvuni.

Neyvan gullmerki

Við sigrinum hildu strandingar fyri sín part fast í lítla møguleikanum, sum teir enn hava fyri FM-heitinum. Hvussu realistiskur hesin møguleiki er, kann altíð trætast um, men so leingi hann er til staðar, so er hann har.

At teir eru førir fyri at koppa vestmenningum sóu vit um vikuskiftið, men skulu gullmerkini koma til høldar, er hetta neyðugt tvær ferðir afturat, umframt at vestmenningar helst skulu snáva aðra staðni við, so alt í alt krevur hetta eitt sindur av hvørjum.

Hinvegin er eingin ivi um, at talan verður um heiðursmerki hjá teimum, og so verður spurningurin bara, hvat slag hesi verða gjørd av.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

H71: Halgir Dahl Olesen 11(4), Annfinn N. Debes 3, Johnny Durhuus 2, Rolf Mouritsen 2, Olaf Vestergaard 2, Hallur Danielsen 1, Rene Dahl Olesen 1

StÍF: John Petersen 9, Jón Rasmussen 6, Bent Djurhuus 3, Artur Johansen 3(1), Marius Joensen 3, Andre Danielsen 3, Kristian Petursson 2, Leivur Justinussen 1, Alexandur Johansen 1

Brotskøst: H71 5, StÍF 3

Útvísingar: H71 6, StÍF 1

Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen. Høvdu eina hampuliga lætta uppgávu, sum teir tó stýrdu við harðari hond, og millum fingu leikarar greið boð, tá teir høvdu hug at brúka seg ov nógv.



H71 megnaði als ikki at geva nýkosnu steypavinnarunum mótstøðu, tá liðini hittust mikukvøldið
Mynd:Álvur Haraldsen

gult cyan magenta svart